# Fjøldin fagnaði Hanusi

Eirikur Lindenskov
Myndir: Jens Kristian Vang

Fríggjadagin var stórur føðingardagur hildin í Norðurlandahúsinum í sambandi við, at Hanus G. Johansen fylti seksti. Klingran var fullsett, og millum tey sum heiðaru Hanusi vóru Helena Dam Neystabø, landsstýriskvinna í almannamálum, Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, vinmenn so sum Rudolf Joensen og Egi Dam.

Hanus framførdi eisini saman við Aldubáruni, Egi Dam las yrkingar hjá Pól F. og gentukóri Cantabile sang eisini saman við Hanus.

Í sambandi við føðingardagin varð givin út fløga við fimm av hansara løgum til yrkingar hjá Hans J. Glerfoss, »Eitt blað eg á kann skriva«, kallast fløgan. Tað er Jens L. Thomsen, sum hevur framleitt fløguna.

Løgini til tær fimm yrkingarnar hjá Hans J. Glerfoss hevur Hanus gjørt millum 1979 og 1990.

Leygarmorgunin helt føðingardagurin hjá Hanus fram í Leikalund í Klaksvík, har Hanus hugleiddi um nýggju fløguna.





Hann greiddi frá løtum saman við Hans Jacob Glerfoss og m. a. at hann á einum lítlum biltúri fekk eina yrking frá Hans Jacob Glerfoss, hann skrivaði eftir ferðini, sum Hanus í somu stund gjørdi lag til.

Hansara fyrsta lag til yrking av Hans Jacob Glerfoss varð gjørt til yrkingina »Yrking um lívsins yrking« í 1979.

Hanus, sum eisini er væl kendur í Mikladali, hevði eisini gjørt lag til »Mylláin« hjá Hans Jacob Glerfoss, sum er føddur í Mykladali – Mylláin er vakra áin, sum rennur gjøgnum bygdina og eisini til mylluna niðast í bygdini – áin kann siga manga søguna, eisini um tey mognu, sum hava skoðað hana.

Eftir konseritna og hugnaløtuna í Leikalund beyð Hanus til kaffi og eina serliga lagkøku, sum var gjørd til Hanus. Hanus var í góðum hýri og kendi seg rættiliga heima og fekk eitt gott prát við tey mongum, sum vóru komin at ynskja Hanusi tillukku.

21. august í ár - á Sjómannadegnum - verður ein størri konsert í Badmintonhøllini, Hanusi G. Johansen til heiðurs.

eirikur@sosialurin.fo





Myndir: Dávur Winther